Dimmalætting

Stovnað 1878
Ábyrgdarbladstjóri: Beate L. Samuelsen
Bladstjóri: Georg L. Petersen
Útgevari: P/F Dimmalætting
Prent: Dimmalætting

AVGREIÐSLA: Mánad. til hósd. kl. 8.00-17.00. Friggjad. kl. 8.00-16.00. Leygard stongt. Tlf.-avgreiðsla kl. 8.00-16.00.
Tlf. 311212. Fax: 310941. Smyrilsvegur 13, Postboks 19, FO-110 Tórshavn.
e-mail: redaktion@dimma.fo, prent@dimma.fo, lysing@dimma.fo, haldari@dimma.fo, bokhald@dimma.fo, kronikk@dimma.fo, vidskerin@dimma.fo

INNLATINGARFREIST FYRI LÝSINGAR

	Týsdagsbladið	Mikudagsbladið	Hósdagsbladið	Friggjadagsbladið	Leyg.dagsbladið
1/4 síða ella størri	frí. kl. 12	mán. kl. 12	týs. kl. 12	mik. kl. 12	hós. kl. 12
Minni enn 1/4 síða	frí. kl. 14	mán. kl. 16	týs. kl. 16	mik. kl. 16	hós. kl. 16
Okkara Gulu	fr. kl. 15		týs. kl. 15		hós. kl. 15

Lýsingar, ið nógv arbeiði er av, mugu vera inni í góðari tíð.
Lítlýsingar og lýsingar við framíhjáplássi skulu bíleggjast í góðari tíð.

Vanligar treytir: Síðustødd: 8 teigar á 41x515 mm. 1/1 síða 4.160 mm. Útsjónd: Lýsingar, sum eftir bladsins meti kunnu mistakast fyri bladtilfar, skulu merkjast við orðinum: Lýsing, sum verður roknað uppí lýsingarmátið. Orðið INSERAT verður ikki góðtikið. Innlatingarfreist fyri lýsingar: Sæst á skemanum til vinstru.

Fyrivarni: Innihaldið í lýsingunum má ikki stríða móti galdandi løgum. Ábyrgdina fyri hesum hevur lýsarin. Bladið tekur sær rætt til at sýta at taka lýsingar við, sum bladið metir óynsktar.

Teknisk viðurskifti og umhugsan fyri lesarum og lýsarum ger, at bladið má tilskila sær rætt til at
1. gera smærri týdningarleysar broytingar í lýsingum hvat teksti og uppsetan viðvíkir.
2. skjóta út eina lýsing til seinni blað.
Lítlýsingar kunnu bert takast við, um teknisku viðurskiftini loyva tað.

Endurgjald fyri møguligar villur, sum lýsarin sjálvur ikki hevur skyldina fyri, er vanliga prísavsláttur eftir bladsins meti um virðisminkan av lýsingini, men í mesta lagi at lýsingin, ella líknandi lýsing, verður tikin við aftur seinni ókeypis. Villur, sum standast av vanaligum lýsingartilfari hevur bladið onga ábyrgd av.

Lýsingar, sum verða inntelefoneraðar, verða altíð lisnar uppaftur, og bladið tekur tí onga ábyrgd fyri villur, sum koma á henda hátt.

Vón um frið á hvítusunnu

TAÐ er viðhvørt, líkasum vit hava gloymt alt tað ræðuliga, sum fer fram í Jugoslavia í løtuni. Meðan útlendskir fjølmiðlar framvegis gera nógv burturúr og greiða frá øllum tí óhugnaliga, sum har fer fram hvønn einasta dag, eru tíðindini um kríggið á Balkan í okkara heraðshorni ikki so aktuelt longur.

Tíverri

Teir ræðuleikar, sum farnir eru fram í Kosovo-landslutinum í fleiri mánaðir, eru eins ræðuligir framvegis. Hvør einasta menniskja, sum sleppur við lívinum, veit um ræðuleikarnar at siga, hvør verri enn annar.

Almenna kjakið í Føroyum at lata flóttafólk haðani sleppa at kenna hitan aftur í eini familju í einum tryggum heimi, har vit kundu gjørt okkara til at hjálpt onkrum, er slept.

Ræðumyndirnar, sum sjónvarpsstøðir senda inn í hvørt heim, rína ikki við okkum á sama hátt sum fyri einum mánaði síðani.

At fólk verða rikin frá húsi og heimi, hevur ikki somu ávirkan á sinnið.

Familjur, pettaðar sundur, kústaðar burtur frá øllum tí, tey áttu, píndar og plágaðar, áðrenn farið verður um mark, um fólk eru so heppin, at tað eydnast, setir kenslurnar í kók, ta løtuna vit síggja ella hoyra um hetta, fyri síðani at dána burtur aftur, við at snarað yvir á aðra rás ella lurtað eftir meiri heimligum tíðindum, hvussu gongst at fáa teir ymsu lønarsáttmálarnar í hús, undirskriving av marknaavtaluni, fremmandavitjanir, og hvussu lembingin hevur gingist.

Eitt hitt óhugnaligasta í so máta er tann gongd, sum kríggið á Balkan hevur fingið, nevniliga, at okkum skal tykjast synd í Milosevic og hansara næstrafólki, hvørja ferð ein NATO-rakett rakar annað mál enn tað upprunaliga ætlaða. Sjálvandi er tað ræðuligt, at kríggj skal vera seinasta og einasta loysnin at fáa frið í lag, og at tað skal vera einasta vápnið, sum takast kann í nýtslu fyri at fáa sinnisveikar ríkisleiðarar at makka rætt.

Kríggj gongur tíverri altíð út yvir ósek fólk. Men er tað ikki júst tað, tað ger í Kosovo?

Útlendskar sendistovur, ið liggja soleiðis fyri, at tær liggja nær upp at jugoslaviskum hermannaíbúðum ella ráðleggingarstovum Milosevics, vita, hvussu vandamikið tað er at vera í Jugoslavia í løtuni. Neyvan slepst undan at raka sivil mál í einum kríggi, og tí er at halda seg burtur, tá støðan er so álvarslig, og til ber at fara aðra staðir. Tað er tann møguleikin, ið fólk á útsettum sendistovum hava, meðan við í hesum førinum í Kosovo-málinum hava við meiri enn eina millión av fólki at gera, sum ongastaðni kann fara fyri at søkja sær skjól undan harðrendum leiðara. Landið er í kríggi.

Sjálvandi er tað óheppið, at kinesiska sendistovan varð rakt av rakett herfyri, og at svenska sendistovan kom út fyri einum so hørðum bresti, at ein úthurð varð blást inn ella út. Men hatta er vandin at liggja í einum krígsøki.

Sviar mótmæla, at NATO-rakettirnar eru so sterkar, at tær oyðileggja, tá tær raka. Nakað er um hetta, men at senda veikar rakettir inn í bygt øki, har svensk sendistova er, og tær sterku aðrastaðni, tá kríggj er, er ikki tað, sum tað snýr seg um í løtuni. Sviar hava orð fyri at halda seg uttanveltaðar í krígstíð eins og Sveits, men spurnartekin kann viðhvørt setast við uttanveltaðan politikkk, tá talan er um inntøkur av krígsútgerð og peninga- og virðisgoymslum í krígstíð.

Hvítusunna er, og vóna vit inniliga, at kanska hetta verður høgtíðin, har friður fæst í lag á Balkan, hóast útlitini ikki tykjast so góð.

Gleðiliga hvítusunnu.

Tøkkir

Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum teimum mongu, ið sýndu samkenslu og hjálpsemi á ymiskan hátt, tá kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

Annelena Zachariassen
Hattarvík

lá sjúk, doyði og varð jarðað.

Familjunnar vegna
Børnini

Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum, sum mintust til mín á føðingardegnum 18. apríl. Ein serstøk tøkk til børnini fyri teirra stuðul og hjálp.

Anna

Hjartaliga takk øll tit, sum gleddu meg og míni á seksti ára føðingardegi mínum.

Heilsan
Karla Toftenæs

Øllum tykkum, sum á ymsan hátt gleddu okkum á hjúnabandsdegi okkara 29. desember 1998, takka vit hjartaliga.

Ingibjørg og Jóanes



Eg og foreldur míni takka hjartaliga øllum tykkum, sum á ymiskan hátt gleddu meg á fermingardegnum 28. mars 1999.

Heilsan
Hilmar Sveinbjørnsson
Hvalba

Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu, tá góða kona, mamma, vermamma, omma, langomma og systir okkara

Carla Joensen

andaðist og varð jarðað.

Takk til Marjun Bæk prest fyri góð og troystarrík orð, bæði í heiminum og í Kollafjarðar kirkju.
Takk til kirkjutænarar, sangarar, berarar og gravarar. Takk til Anniku Olsen lækna og heimasjúkrasystrarnar fyri tykkara hjálp.
Stóra takk fáa tit, sum stílaðu fyri ervinum í Bygdarhúsinum, og tit sum lótu buss og bil við førara til og annars hjálptu til á ymiskan hátt.
Takk fyri blómur, kransar, peningargávur, telegramm, brøv og uppringingar innan- og uttanlands.
Takk tit mongu, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

Familjunnar vegna
Didrik

Eg takki øllum, sum gjørdu mær 90 ára føðingardagin tann 21. apríl so minniligan.
Tøkk til tykkum, sum stukku inn á gólvið í Missiónshúsið at heiðra meg.
Tøkk fyri gávur, blómur, fjarrit og telefonsamtalur.
Harrin signi tykkum øll.
Við ynski um eina góða hvítusunnu

Elsa Olsen
Argjum

Hjartaliga takka vit øllum sum við gávum, telegrammum og á annan hátt gleddu okkum brúdleypsdagin 1. apríl 1999.

Ruth og Valdemar

Vit vilja hervið hjartaliga takka øllum tykkum, sum á ymiskan hátt gjørdu hjúnabandsdag okkara 2. januar 1999 ógloymandi.

Martha og Tummas Pauli Mýri

Brøv til Dimmalætting

Útvarpið – okkara miðil

Nú vetrarskráin í útvarpinum er av, vil eg fegin senda eina heilsan.

Útvarpið er nógv framfarið farnu árini. Serstakliga í vetur hevur ligið væl fyri at stuðla boðskapin.

Eg haldi, at starvsfólkini eru óføri. Til dømis hevur garðyrkismaðurin og okkara kandidatur verið knáur, nú hann hevur megnað at lagt tónleikin soleiðis, at vit dagliga hoyra íslendskan og eisini føroyskan tjóðskapartónleik heldur enn fordummandi dansk/amerikanskan. Tað kann handa nýggja óføroyska tónleikarrásin senda. Tað er annars gott, at ÚF hevur longt summarskránna. Soleiðis kunnu vit gera av við nýggju støðina. Eg haldi sum mín flokkur, at ÚF og SvF skulu hava einkarrætt.

Tað er annars gott, at kandidaturin hevur løttu sendingarnar, har hann alla tíðina kann minna á søguliga møguleikan.

Eisini haldi eg, at Vetrarbreytin er suveren (fullveldislig!). Serliga tá rithøvundarnir meta um ríkisrættarliga óskilið – púra óredigerað. Meiri av hasum.

Morgunsendingarnar hava verið framúr. Tá diskoveteranurin lesur úr bløðunum og kryddar við síni óspiltu áskoðan, gevur hann, saman við hermaranum, tað krydd, sum øllum tørvar. Teir eru ókritiskir og politiskt skemtingarsamir.

Men tíðindadeildin er tann besta. Serliga formanninum í Høgættarfelagnum og vjetnamveteraninum lurti eg eftir við andakt. Hann er bersøgin og frálíkur. Tíðindini verða borin hegnisliga, so at vit fáa óspiltu, sáldaðu útgávuna, ið lýsir málini úr rætta sjónarhorninum.

Men vit mugu ikki gloyma øll hini. Eg plagi at lurta úr tinginum í SvF, og eg haldi, at tíðindini verða væl redigerað í ÚF, áðrenn tey fara í luftina. So á tíðindadeildini sláa tey ikki falskar mentir, haldi eg.

Eini góð ráð til leiðsluna í útvarpinum. Nú vit hava søguliga møguleikan, eiga tit at standa móti ræðumyndunum. Tit eiga at hála afturhaldskreftirnar úr skotgravunum. Tær, sum eiga innivist í einoygdu politisku bløðunum, serstakliga Sosialinum og Dimmalætting. Tí eiga tit at bíða eftir rætta manninum at loysa kvívíkingin av. Kanska var tað eitt hugskot at latið arvafylgjuna aftur vunnið hevd. Tí tit mugu fáa ein, sum skilir skipaðu leiðina.

Annars kundu tit gjørt sum í SvF. Har settu teir ein framúrskarandi, botnseriøsan leiðara á tíðindadeildina. Ein, sum eingin kann ákæra fyri at hava nakra politiska hensigt. Hugsið bara um hansara knallgóðu spurningar á tíðindafundinum um undirgrundina! Hann dugir at skilja politisku bukkarnar frá fárunum.

Eg slapp ikki á fundin í útvarpshøllini, sum flokkurin skipaði fyri mikukvøldið, men takk fái tit fyri, at almenningurin fær rætta samandráttinum.

Haldið á við lagda programmpolitikkinum við klokkuklárum mannagongdum, har treytaleyst nærlagni er leiðin, m.a. eisini við sendingunum úr Fugloy, Gjallarhorni o.s.fr., o.s.fr.

Summi siga, at ÚF er partískt. Tað passar ikki. Eg haldi, tit verja borg, tit berjast móti ræðumyndunum, tit verja søguliga møguleikan, tit draga úr skotgravunum, tit ... Eg gjaldi mítt lógartvingaða útvarpsgjald við gleði.

Stak væl nøgdur lurtari

Viðmerkingar

Marknaavtalan eina ferð enn

Tað var ein fegin og vælhýrdur bretskur ráðharri, sum var á vitjan í sambandi við undirskrivingina av marknaavtaluni. Og tað hevði bretski ráðharrin alla orsøk til at vera. Allir føroyingar vóru blíðir og tíðir, og tað skulu vit sjálvandi eisini vera. Bretar hava einki skeivt gjørt, teir hava roynt at sæta sær, og tað eydnaðist framúr væl.

Áðrenn bretski ráðharrin kom, høvdu føroyskir samgongumenn kappast um í fjølmiðlunum at róst hvør øðrum fyri hetta framúr góða úrslit, hóast bretar høvdu vunnið á okkum við 85-15. Dávid hevði vunnið á Goliat, segði Tjóðveldisflokkurin o.s.fr., o.s.fr.

Ræðast fyri Haag

Fyri at káva út yvir kleyvarskapin royndu teir at fullvísa hvør annan og føroyingar allar um, at høvdu teir ikki slept øllum endum og slakað fyri bretum, so hevði málið longu verið lagt fyri dómstólin í Haag. Hetta er, sum eg havi sagt fyrr, tað bera tvætl.

Seinasta leygardag hevði Sosialurin eina samrøðu við ein av oddamonnunum í bretsku samráðingarnevndini øll árini (arbeiddi fleiri ár á bretsku sendistovuni í Keypmannahavn. Seinastu tíðina hevur hann verið á høgum støði í uttanríkisráðnum í London, til hann nýliga varð settur sum ambassadørur í Marokko) Anthony Layden.

Sosialurin royndi av øllum alvi at fáa bretan til at viðganga, at vandi var fyri, at málið endaði í Haag, men bretin var fullkomiliga ósamdur við teir.

Hann vísti á, at ein búskaparlig kanning fyri fleiri árum síðan hevði víst, at tað var meira lønandi at fáa eina miðlinjuloysn enn at bíða í fleiri ár eftir einari avgerð úr Haag. Bretar hava sostatt fyri fleiri árum síðan tikið ta støðu, at teir fóru ikki til Haag. Hesi somu árini hava tjóðveldismenn, javnaðarmenn og fólkafloksmenn gingið hjólbeintir av bleytum maga av berari ræðslu fyri, at bretar drógu okkum til Haag.

Støðufestið

Anthony Layden segði eisini: »Høvdu tit ikki verið so avgjørdir, høvdu tit kanska ikki fingið tað økið, sum tit í dag hava fingið í avtaluni. Høvdu tit hinvegin verið minni avgjørdir, so høvdu tit kunnað fingið eina loysn fyrr.«

Og tá Anthony Layden tosar um støðufesti, er tað av góðum grundum neyvan tjóðveldismenn, javnaðarmenn ella fólkafloksmenn, hann hugsar um.

Bretin sigur júst tað sama, sum Sambandsflokkurin hevur ført fram øll árini. Og um henda samgongan helt fram við sama støðufesti sum undanfarna samgonga, høvdu vit møguliga bíðað nakrar mánaðir afturat, men høvdu mist nógv minni av okkara parti av gráu leiðini, sum menn meta vera eitt serliga oljuríkt øki.

Skriftin á vegginum

Formaðurin í uttanlandsnevndini, Hergeir Nielsen, hevur sæð skriftina á vegginum og roynir í sínum lagi at burturforklára kleyvarskapin við at fara eftir manninum heldur enn bóltinum.

Tær nógvu mótsigandi framløgur og greinar frá Javnaðarflokkinum og Sosialinum vísa týðiliga, at ljósið eisini er gingið upp fyri teimum.

Skriftin er so klár, at alt bendir á, at sjálvt Bjarni



Djurholm úr Fólkaflokkinum nú hevur skilt, hvat málið veruliga snúði seg um.

Eitt er, at menn blíva bangnir, sleppa endanum og lata frá sær ríkidømi, sum allir føroyingar eiga.

Nógv meira syrgiligt og ómansligt er tað, at teir við einkisigandi reypi royna at káva út yvir sín egna kleyvarskap.

Edmund Joensen